# Etingarólag er spurningur um kenslur

**– Tað ræður um at finna hurðina inn til sjúklingin. Etingarólag er bert eitt sjúkutekin ella mistrivnaður, sum vísir seg við, at sjúklingurin ikki vil eta, sigur Terji Kollsker**

ETINGARÓLAG
*Dagny Joensen*

Í síðsta Vikuskifti var samrøða við 42 ára gomlu Janu E. Thomsen, sum um 14 ára aldur fekk etingarólag. Tá var eingin rættilig skipað viðgerð í Føroyum, men í dag fáa fólk við hesum sjúkum viðgerð á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum.

Vit hava tosað við Terja Kollsker, sálarfrøðing og Sanne Storm, musikterapeut, sum dagliga eru um sjúklingar við etingarólag.

Terji Kollsker sigur, at einki mark er fyri, hvussu nógv ella lítið sjúklingar við etingarólag skulu viga, fyri at verða innlagdir, men tá BMI -talið er umleið 17 er vandi á ferð. Kemur hetta talið niður um 15, byrjar sjúklingurin at vera illa fyri sálarliga, hevur torført við at miðsavna seg og síggja samanhangin í síni støðu. Tað vil siga, at heilin ikki virkar nóg væl. Tá kann tað verða trupult at veita sjúklingum holla viðgerð.



*Sanne Storm, musikterapeutur og Terji Kollsker, sálarfrøðingur, hava seinasta árið gjørt royndir við at samskipa viðgerðina av sjúklingum á psykiatrisku deild. Úrslitið hevur verið væleydnað, sigur tey bæði*

## Best at veita ambulanta viðgerð

Av tí at talan ofta er ungfólk um 15 ára aldur, er best um sjúkling-ur kann fáa ambulanta viðgerð, fyri ikki at órógva skúlagongd, samveru við vinir og familjuna o.s.fr..

Annar trupulleiki er, at psykiatriska deild ikki hevur barna- og ungdómsdeild. Tí mugu hesir sjúklingar innleggjast saman við øðrum sjúkum og eldri fólki á deildini.

- Eru sjúklingarnir serliga illa fyri, verða teir sendir á Ríkishospitalið í Keypmannahavn, har ein deild er fyri fólki við etingarólagi. Tað kemur fyri umleið tvær til fýra ferðir árliga. Har eru teir í viðgerð frá trimum mánaðum upp í eitt ár, sigur Terji Kollsker.

Verða sjúklingar kortini innlagdir á psykiatrisku deild á Landssjúkahúsinum verða teir læknaliga kannaðir og fáa kostplan, fysioterapi og tilboð um musikterapi og sálarfrøðiliga viðgerð.

Sanne Storm, musikterapeutur og Terji Kollsker hava seinasta árið arbeitt við musik og sálarfrøðiligari viðgerð, higartil við góðum úrsliti.

## Nýta musikterapi

– Innan musikterapi nýta vit ljóðið sum medie, fyri at fáa sjúklingin at geva seg til kennar. Tú kanst siga, at vit brúka tónleikin í staðin fyri orð, sigur Sanne Storm og leggur aftrat: - Ofta verður sagt, at etingaólag ikki snýr seg um mat, men um kenslur. Í nøkrum førum er tað ein trupulleiki hjá sjúklingum at málbera seg, og tá kann tónleikurin verða ein fyrimunur, sigur Sanne Storm.

- Um vit taka sálarfrøðiliga viðgerð og musikterapiina undir einum, so samstarva sálarfrøðingur og musikterapeutur á tann hátt, at tey kunnu siga hvørjum øðrum, hvat sjúklingurin hugsar og ger.

- Tað ræður um at finna hurðina inn til sjúklingin. Etingarólag er eitt sjúkutekin ella mistrivnaður, sum vísir seg við, at sjúklingurin ikki vil eta. Tað er sum við børnum. Eingi børn eru líka, tey skulu stimbrast á hvør sín hátt. Sjúklingur við etingarólag skal stimbrast í at læra seg sjálvan at kenna ella, við øðrum orðum, læra seg at liva, sigur Terji Kollsker.

## Familjuterapi

Viðvíkjandi ambulantu viðgerðini av sjúklingum við etingarólagi, halda sálarfrøðingur og musikterapeutur, at úrslitini higartil hava verið góð. Tey bæði hava gott samband við tann sjúka og familju hansara. Umframt at sjúklingur gongur til viðgerð eina ferð um vikuna ella so, er eisini familjuterapi. Tað hevur alstóran týdning at familjan verður tikin við, av tí at tað ávirkar øll í familjuni, tá ein teirra fær etingarólag

Um hvussu sjúklingar fáa samband við psykiatriska deild, sigur Terji Kollsker, at vanliga eru tað kommunulæknar, skúlar, sosialu deildirnar hjá Almannastovuni kring landið ella hinar deildirnar á Landssjúkrahúsinum, sum ávísa sjúklingarnar.

Einir seks-sjey sjúklingar við etingarólag eru í løtuni í viðgerð, ein langtíðar viðgerð, sum krevur nógva orku.

Eisini verður fyri ein part gjørt uppsøkjandi arbeiði, har farið verður á heimavitjan at tosa við sjúkling og familju. Royndir at veita familjuterapi í heiminum hevur eisini hildnast væl, eitt nú fyri fáa tann sjúka at taka ímóti viðgerð. Tað hevur verið lættari, tá heimavitjan hevur verið partur í arbeiðinum.

## Neyðugt við barna- og ungdómsdeild

- Tað líkist ongum, at vit onga barna- og ungdómspsykiatriska deild hava. Tí verða teir sendir niður til Danmarkar í viðgerð. Tað er eingin góð loysn, at taka tey ungu burtur úr egna umhvørvi, frá foreldrum og vinum, sigur Terji Kollsker, sum kom til Føroya at arbeiða fyri tveimum árum síðan.

Áðrenn hann kom henda vegin, starvaðist hann í níggju ár sum kliniskur psykologur á depli fyri børn og ung á Bornholm.

Júst tá varð barna- og ungdómspsykiatrisk deild sett á stovn. Terji Kollsker var við í fyrireikingararbeiðnum, og skuldi eftir ætlanini byrja at arbeiða har.

Sanne Storm hevur somuleiðis arbeitt á barna- og ungdómspsykiatriskari deild á sjúkrahúsi í Ålborg í nógv ár, áðrenn hon fyri góðum trimum árum síðani kom til Føroya at arbeiða.

Hagtøl vísa, at í fjør vóru umleið 50 mál við børnum og ungum viðgjørd á psykiatriska deild. Tað prógvar at stórur tørvur er á barna- og ungdómspsykiatriskari deild í Føroyum.

- Etingarólag er bert ein lítil partur av hesum, men tað neyðuga, fyri at vit kunnu fullfíggja viðgerðina við etingarólag, er fyrst og fremst at vit stovna barna- og ungdómspsykiatriska deild, harnæst at vit skipa eitt toymi við sjúkrasystrum, fysio-terapeutum, skúlalærarum, pedagogogum, musikterapeuti, sálarfrøðingum og psykiatarum.

- Tað er fyritreytin fyri at fáa viðgerðina at rigga til fulnar, sigur Terji Kollsker og leggur aftrat: Vit hava útbúgvið starvsfólk til hesa uppgávu - okkum tørvar bert deildina.

Í tilmæli, sum er gjørt, um stovnan av barna- og ungdómsdeild stendur, at henda deildin skal verða veruleiki í 2006, so nú bíða tey bara eftir at nakað verður gjørt við málið.

## Graslíki kann elva til krabbamein

Svenskar kanningar staðfesta, at tað kann vera lívshættisligt at spæla fótbólt á grasliki, um talan er um vallir av sonevnda triðja ættarliðið av grasliki. Tað vil siga vallir, har gummikúlur verða nýttar í vøllinum.

Gummikúlurnar eru ætlaðar at fáa bóltin at bera seg at á sama hátt, sum hann ger á veruligum grasi, men tað er ikki júst hesin eginleikin, sum er vandamikil. Hinvegin eru hesar kúlurnar í fleiri førum framleiddar úr gomlum lastbiladekkum, og slíkt gummi kann innihalda PAH-oljur, sum eru krabbameinselvandi.

Norska Verdens Gang skrivar, at sambært serfrøðingum, er ymiskt, hvussu vandamiklar kúlurnar eru, men tær kunnu vera vandamiklar, um tær t.d. koma í munnin á einum spælara, og hesin av óvart svølgir kúlurnar. Hartil merkir slitið, at kúlurnar molast sundur, og tá gerst trupulleikin enn størri.

Í Føroyum eru í løtuni 10 vallir av hesum slagnum, sum verða nýttir av fótbóltsfeløgum. Hartil verður nýggja graslíkið eisini nýtt til sonevndu sparkivallirnar, sum skulu fáast kring landið.

**-jm**